## Nýggir skíggjar í Kastrup

Fyri at betra um kunningina til ferðafólkini eru tey á flogvøllinum í Kastrup nú í ferð við at skfita út telduskíggjarnar kring allan vøllin. Nýggju skíggjarnir síggjast millum annað í Terminal 2, og er talan um stórar bláar flatskíggjar, har tað er lættari at lesa ymsu kunningarnar, enn tað var á gomlu skíggjunum. Næsta stig í útskiftingini verður at skifta teir 57 skíggjarnar, sum síggjast við kekk-in diskarnar á flogvøllinum.




## Íslendskt vatn til USA

Íslendska fyritøkan Icelandic Water Holdings hevur gjørt avtalu við eina amerikanska fyritøku um at selja íslendskt drekkivatn í USA. Icelandic Water Holfings hevur eitt vatnvirki í bygdini Þorlákshöfn á Suðurlandinum og er í ferð við at byggja eitt afturat, og amerikanska avtalan fer, at starvsfólkatalið verður trífaldað, skrivar Morgunblaðið. Sambært blaðnum keypa amerikanarar drekkivatn fyri 11 mia. dollarar um árið, og sølan bara veksur.

## Vóna at fáa Restorff's aftur

**Stjórin í Rúsdrekkasølu landsins sigur, at orsøkin til, at tey ikki selja Restorff's øl longur er, at tey ikki vóru nøgd við mátan, vøran varð leverað uppá**

VINNA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Men í Rúsdrekkasøluni vóna tey at fáa Restorff's øl aftur á hillarnar.

– Tað, sum ikki hevur verið nøktandi er, at vit ikki altíð fingu vøruna, vit bóðu um og at fakturi ikki altíð var latin saman við vøruni, sigur Elsa Maria Holm Olsen, stjóri. Við øðrum orðum er talan um leverings- og fakturatrupulleikar.

Hon slær tó fast, at tað loysti seg hjá teimum at selja Restorff's øl.

- So leingi eftirspurningur er eftir eini vøru, so loysir tað seg hjá okkum at selja hana, sigur Elsa Maria Holm Olsen. Samstundis ásannar hon, at sølan av júst hesum øli er lutfalsliga minkað seinnu árini, men hon vísir tó á, at tað framvegis eru fólk, sum spyrja eftir øli frá Restorff's.

Elsa Maria Holm Olsen sigur seg hava skilt, at ávísir trupulleikar hava verið, sum einki hava við bryggjaríið at gera, ið hevur verið orsøk til nevndu trupulleikar og at tey hava forstáilsi fyri hesum.

- Og vit vóna, at Restorff's framhaldandi kemur at standa á okkara hillum, sigur altso stjórin í Rúsdrekkasøluni.

# Gevast at bryggja – byrja at byggja

**Óla-Svenn Nolsøe, stjóri í Restorff's bryggjarí, váttar, at teir hava sent umsókn um at ríva niður bryggjaríið og ætla at byggja íbúðir har í staðin. Nógv bendir eisini á, at Restorff's gevst við bryggjarínum, men hetta avsannar stjórin tó**

VINNA
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Restorff's hevur bryggjað øl og sodavatn á Landavegi 32 í Havn síðani einaferð í sekstiárunum. Í næstum kann hetta vera eitt yvirstaðið kapittul. Tað váttar stjórin í Restorff's Óla-Svenn Nolsøe.

–Tað er ein langtíðarætlan, og vit eru mitt í planleggingini, men tað er rætt, at vit hava latið eina fyribils umsókn inn, svarar Óla-Svenn Nolsøe, tá vit spyrja hann um ein umsókn er farin til býráðið, um at ríva bryggjaríið fyri at byggja íbúðir har í staðin. Óla-Svenn Nolsøe sigur seg ikki kunna siga meiri um ætlanirnar, men tá hann verður spurdur, um hvussu "langtíðarætlanir" skal skiljast, svarar stjórin í Restorff's bryggjarí:

– Latum okkum siga fýra ár.

Hví skal bryggjarí rívast niður, og íbúðir byggjast har í staðin?

– Bygningurin er ikki egnaður sum bryggjarí, men riggar fint til íbúðir. Eitt bryggjarí kann eisini liggja hvar sum helst og behøvist ikki endiliga at liggja mitt í býnum, vísir Óla-Svenn Nolsøe á.

Tá Restorff's bryggjarí tekur bygningin niður og harvið eisini bryggjaríið, er tað nærliggjandi at hugsa, at teir eisini gevast við framleiðsluni av øli. Men so verður ikki, sigur Óla-Svenn Nolsøe.

– Vit kunnu jú flyta bryggjaríið onkra aðrastaðni í býnum, vísir hann á. Síðani sigur stjórin í Restorff's bryggjarí, at hann ikki fær sagt so nógv meira um málið, tí sum hann tekur til, so er ikki nógv meiri at siga enn tað sama.

### Einki Restorff's í rúsuni

Hóast sjálvur stjórin avsannar spurningin um, at teir fara at gevast at bryggja, so er tað okkurt sum bendir á, at tað ikki er nógv eftir inntil 158 ára gamla bryggjaríið má snara lykilin um. Tí sjónvarpstíðindini í gjárkvøldið vistu millum annað at siga, at tað seinastu tríggjar mánaðirnar ikki hevur borið til at keypt øl frá Restorff's í rúsdrekkasølunum. Og niðri á sjálvum bryggjarínum bar ikki til at fáa øl sum til dømis Munngátt, Pilsnar og Skansaøl.

### Gevast ikki

Sjónvarpið fekk ikki Jóhan Mortensen, ein av eigarunum í Restorff's bryggjaríi, at gera viðmerkingar til málið. Men kortini eru nøkur ting greið longu nú. Restorff's gavst at framleiða sodavatn í 2005. Sama ár høvdu teir 3,8 milliónir krónur í undirskoti, og tað er seinasti kunngjørdi roknskapur hjá bryggjarínum. Restorff's hevur ikki selt øl í rúsuni í tríggjar mánaðir. Munngátt, Pilsnar og Skansaøl fæst ikki á bryggjarínum í løtuni, og umsókn er farin til býráðið um, at ríva bryggjaríið niður fyri at byggja íbúðir har í staðin. Vit spurdu Óla-Svenn Nolsøe, um tað ikki er eitt tekin um, at Restorff's bryggjarí fer at gevast við at bryggja øl eisini.

– Vit bryggja eisini øl framyvir, var svarið vit fingu frá stjóranum.





*Jóhan Mortensen vildi ikki gera viðmerkingar til sjónvarpið í gjár, men Óla-Svenn Nolsøe sigur við Sosialin, at teir ikki ætla at gevast við at bryggja øl*

savnsmynd